oyggj, har tað var nógvur fuglur, og bøndurnir góvu loyvi til at veiða lunda og lomviga. Fingu teir nógvan fugl fekk bóndin landpart. Teir fingu eisini egg.

Vattarnes var ein lítil bygd. Har vóru tvey bóndahús og tvey onnur hús, men um sumrini var nógv fólk har. Har vóru 48 føroyingar og róðu út, tá ið tað var mest. Av hesum vóru 40 úr Lorvík. Men tað vóru eisini nógvir íslendingar, sum róðu út har. Har kundi vera nógvur mjørki. Streymhart var, og tað var ikki so reint fram við landi, so tað mátti ansast væl eftir. Tí var altíð brúk fyri kumpass.

Teir róðu sjáldan langt við árabáti, men teir dugdi væl at laga seg eftir streyminum, so mest kundi fáast burtur úr. Í 1928 fingu teir motor í bátin, og tá lá nógv betri fyri.

Lendingin á Vattarnesi var so sum so. Á fjøru var langt at bera fiskin niðan í kjallaran. Tungt var eisini. Á børuni vóru meira enn 200 pund. Seinni gjørdu íslendingar træbrúgv, sum føroyingar eisini kundu nýta.

Lorvíkingar róðu út á Vattarnesi til út ímóti 2. heimsbardaga. Teir brúktu bæði snøri og línu. Tað var ymist ár fyri ár hvør reiðskapur, ið varð mest nýttur.

Tá ið tað leið út á heystið, plagdu teir at keypa ein seyð frá bóndanum, og áðrenn farið var heim vóru ber hentað at hava heim við til tinganest. Hetta dámdu børnunum sera væl.

Útróðurin til lands helt uppat, tá ið Ísland tók loysing frá Danmark í 1944, og føroyingar mistu síni borgararættindi.

## Til skips

Hans Petur fóru sum aðrir ungir dreingir til skips í 1928. Hann fór við Súluni hjá Niels J. Mortensen á Tvøroyri. Skipari var Johannes Jacobsen, sum eisini var ein kendur lorvíkingur. Foreldrini hjá honum vóru úr Gøtu. Mamman var Emilja, ættað úr Barbustovu í Syðrugøtu, og pápin, Petur Pauli, var úr Tjørnustovu í Norðragøtu. Emilja doyði ung, og tá kom Johannes til Lorvíkar. Jóhannes var skipari í mong ár. Hann hevði gott lyndi at vera á sjónum. Eisini dugdi hann væl at sigla aftur á aftur, t.v.s. at finna fiskin aftur, tá kennið var av. Hann var grammur, og hann var eisini kendur sum skemtari, sum framvegis verður tikin til í Lorvík. Millum menninar, sum vóru við, vóru Óli hjá Guttormi, Martin hjá Fríðriki og Poli hjá Guttormi.

Teir fóru av Fuglafirði. Tað var skjótt, at sjóverkurin fór at gera vart við seg. Men ein slapp ikki bara at liggja fyri tað. Skipsfelagarnir Meinhard við Garð og Tummas á Toftanesi royndu at halda honum til og fingu hann úr koyggjuni. Tá ið teir koma 30 fjórðingar úr landi gjørdist stilli, og tað var nógvur fuglur. Tá var farið í skipsbátin at skjóta fugl.

Í bátinum var eingin trupulleiki við sjóverki. Hans Petur var jú vanur við at vera í báti. Men so skjótt komið varð umborð aftur á skipi, var aftur galið við sjóverkinum, men tað javnaði seg sum tíðin gekk.

Komið verður so á Kollmunnagrunnin, har teir skuldu fiska. Fyrsta uppgávan var at gera lodd til. Hetta var tungt, men tað gekk.

Í 1935 fer Hans Petur aftur til skips við Jóhannusi, hesa ferð við Vágoynni. Hann var eisini við Loytnantinum við Kristian í Bø á Strondum sum skipara.

Hans Petur fór síðan við Vilhelminu, sum tá hoyrdi heima í Gøtu. Sámal Hans Hansen var skipari, og Tummas Jakku á Geilabø var reiðari. Her vóru nógvir gøtumenn við. Hetta vóru ikki so góð fiskiár. Men Hans Petur var tó omanfyri miðal sum fiskimaður.

Sámal Hans hevði verið bestimaður hjá Óla Hans Olsen, sum eisini var ein kendur skipari, ættaður út Tøðuni við Gøtugjógv. Sámal Hans var hógligur, raskur og harðførur. Hans Petur letur sera væl at gøtumonnum at vera saman við.

Hans Petur var í 1935 við Polarstjørnuni. Tað gekk illa. Teir fingu bert 35.000 fiskar, so avrokningin var sera lítil. Skiparin var Hans Jacob, beiggi Christian Matras, professara.

## Avmarkaður møguleikar hjá ungum dreingjum

Tá í tíðini vóru ikki so nógvir møguleikar hja ungum dreingjum, tað sama var við gentum. Valið var millum at gerast skipsmaður ella at gerast lærari ella kanska til dømis skræddari. At vera skipsmaður gav bert arbeiði um summarið, meðan tað hjá ungum dreingjum lítið og einki varð gjørt til nyttu um veturin. Hetta dámdi pápanum so púra einki. Ein vetur hevði Hans Petur tó brúkt til at fáa sær setiskiparaprógv.

Tann møguleikin, sum nógvir brúktu, var at fara til Danmarkar, har møguleikarnir fyri arbeiði vóru so nógv størri. Hetta valdi Hans Petur eisini. Hann var so heppin at hava fólk at koma til í Danmark, tí systirin Gretha búði jú niðri. Harald, sum var giftur við Grethu, arbeiddi á Tuborg, so hann fekk skaffað



*Hansina, systir Hans Petur, var gift við Jóan Jakku á Brúnni í Norðragøtu. Her eru tey saman við ommu- og abbadóttir Hallgerð*

Hans Peturi arbeiði har fyri summarsesongina. Harald hevði Bentsen til eftirnavn. Hann var í ætt við Bent Bentsen, sum er varaforsætisráðharri í Danmark.

Hans Petur hevði ongan hug at fara heim aftur so beinanvegin. Tískil fór hann at læra til múrara. Hetta skuldi verið ein góð framtíð við øllum tí byggiarbeiði, sum roknast kundi við í Danmark hesa tíðina.

Men tá er tað, at kríggið brestur á, og Danmark verður hersett 9. apríl 1940. Hetta merkti, at steðgur kom í alla bygging. So ótrygt sum alt nú varð, var eingin sum tordi at fara í holt við nakað so óvíst sum bygging. Hetta merkti eisini, at sambandið við Føroyar varð avkvett. Tað var einki ferðasamband og stórt sæð heldur einki postsamband.

## Søkir á politiskúla

Hans Petur tekur tá tað stig at fara á handverkaraskúla, so hann kundi brynja seg betur á tí økinum.

Men umframt tað søkir hann inn til politiið, uttan at hann rættiliga gjørdi sær greitt, hvat hetta arbeiði snúði seg um.

Meðan Hans Petur er á handverkaraskúlanum, fær hann boð um at koma til upptøkuroynd hjá politinum.

Tá sum nú var talan um royndir á ymiskum økjum. Ein av hesum royndum var, at hann skuldi ganga gjøgnum eini myrk hús við seks verilsum. Aftaná skuldi hann skitsa tað upp. Hetta gekk bara væl. Síðan skuldi skrivast danskur stílur. Har fekk hann mg, svarandi nøkurlunda til tað, sum vit kenna sum 8. Hetta var eisini nóg gott hjá einum, sum ikki hevði danskt sum móðurmál.

Skjótt kemur boð aftur frá politinum um, at hann skuldi byrja beinanvegin. Hetta skiltu tey væl á handverkaraskúlanum, tað var alt í lagi at fara av skúlanum.

Síðan gekk Hans Petur trý ár á politiskúlanum og fekk so starv. Lønin var tá kr. 257 um mánaðin, og teir giftu fingu 70 krónur eyka. Húsaleigan var 70 krónur um mánaðin. 36 krónur fóru í skatt um ársfjórðingin. So tað vóru ikki stór tøl.

## Sjópoliti

Tá ið útbúgvingin var liðug fór Hans Petur at starvast sum politistur. Hann fær starv í sjópolitinum. Sum gamal fiskimaður, sum eisini hevði skiparapappír, var hann hampiliga sjálvskrivaður til eitt slíkt starv.

Sjópolitiið var sett á stovn sum mótspæl til týska eftirlitið av danska sjóøkinum.

Danir høvdu fýra skjóttgangandi bátar. Vanliga vóru teir fýra mans við, men teir kundu eisini klára seg við minni. Teir skuldu hava eftirlit við øll skip, sum komu og fóru úr havnini. Tá ið tað vóru so stór skip, at tey ikki kundu leggja at, vóru bæði týskarar og danir, sum høvdu eftirlitið.

Tað vóru eisini viðhvørt týskarar við bátunum. Vanligir týskir hermenn vóru einki problem. Teir vóru ofta úr Hamburg, har nasisman ikki hevði somu fastatøkur sum aðra staðni í Týsklandi.

Men størri vandi var, tá ið SS-arar eisini mannaðu bátarnar. Men teir vóru eisini mettir sum ein hóttan av vanligu týskarunum, sum góvu donsku politustunum tekn um, hvør av týskarunum, ið var SS-ari, so teir kundu vara seg.

## Politiið mátti gera skitna arbeiðið

Undir krígnum vóru umstøðurnar heilt serligar. Støðan var jú tann, at formelt var tað danska stjórnin, sum framvegis hevði ræðið. Men reelt vóru tað týskarar, sum vóru hægsta vald. Stjórnin varð trýst at eftirlíka týskarum í síni kúging av fólkinum. Her var støðan alment tann, at víst máttu danskir politikkarar taka avgerðir, sum gingu útyvir borgararnar. Men alternativið kundi vera, at týskarar beinleiðis tóku valdið, og tað hevði verið so nógv verri.

Tey, sum stóðu fyrst fyri skotum, var politiið. Hetta kom rættuliga til sjóndar, tá ið Týskland legði á Sovjet í 1941. Tá gav hersetingarvaldið boð um at taka allar teir leiðandi donsku kommunistarnar og at seta teir í varðhald. Hetta var beinleiðis í stríð við grundlógina. Danska stjórnin álegði politinum at gera hetta. Grundgevingin var, at um danir ikki gjørdu tað, gjørdu týskarar hetta sjálvir. Seinni varð samtykt ein lóg í fólkatinginum, sum gava heimild til ikki bert at handtaka leiðandi kommunistar men eisini slík, sum kundu hugsast at fara at gerast kommunistar!

Hans Petur var tó ikki við í hesum tiltaki, men hetta vísir hvussu truplar umstøðurnar vóru.

Tey fyrstu árini undir hersetingini vóru sum so friðarlig, men seinni, tá ið mótstøðurørslan tók seg upp, gjørdist meira buldrasligt. Hetta var eisini samstundis, sum tað fór at